Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 8

ISSN 0907-905X

Nr. 21 23. mars 2011

**Kunngerð**
**um**
**inntøkutrygd og forskotskipan**

Við heimild í § 8, stk. 3 í løgtingslóg nr. 132 frá 28. desember 2010 um Trygdargrunn fiskivinnunnar verður ásett:

## Kapittul 1

*Minstaløn*

**§ 1.** Minstaløn verður veitt fiskimonnum við bústaði í Føroyum, sum:

1) eru mynstraðir við fiskiskipi, sum er 30 tons ella størri og skrásett í Føroyum,
2) eru mynstraðir við fiskiskipi, minni enn 30 tons og skrásett í Føroyum, um skipið rekur fiskiskap uttan fyri føroysku landleiðirnar.

*Stk. 2.* Persónum, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar, og sum frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum í minsta lagi 5 ár tilsamans, verður veitt minstaløn og dagstudningur, sambært ásetingunum í stk. 1, hóast teir ikki hava bústað í Føroyum.

*Stk. 3.* Fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum fáa egndar línur av landi, koma ikki undir skipanina við minstuløn.

*Stk. 4.* Fiskimenn skulu, fyri at koma undir skipanina við minstuløn, verða løntir samsvarandi galdandi sáttmálum á økinum.

*Stk. 5.* Tons sambært hesi kunngerð merkir tonsatal brutto (BT) ella skrásett brutto tons (BRT), sum til eina og hvørja tíð tilskilað á skipsins málibrævi ella máliprógvi.

*Stk. 6.* Fiskiskip hava skyldu at lata Trygdargrunni fiskivinnunnar avrokning fyri hvørja mynstring, so skjótt avrokningin fyriliggur, og ikki seinni enn 3 mánaðir eftir, at túrurin er endaður. Avrokningin skal vísa, hvat hvør einstakur av manningini hevur fingið í hýru fyri túrin. Saman við avrokningini skal fylgja skjalprógv fyri avreiðingarvirðinum. Eisini kann grunnurin krevja neyðugt skjalprógv fyri uppgerðina annars.

**§ 2.** Minstalønin er kr. 700 um dagin. Minstalønin verður ikki veitt fyri teir dagar, fiskimaður er heima. Hvør túrur verður roknaður at byrja, tá farið verður úr føroyskari havn, og at enda, tá komið er aftur í føroyska havn. Fyri ídnaðarskip, rækjuskip og frystiskip á fjarleiðum, kann túrur verða roknaður at byrja og enda í útlendskari havn.

*Stk. 2.* Minstalønin verður skerd við avrokningini, sum maður fær fyri tann ávísa túrin. Frítíðarløn verður ikki íroknað avrokningina.

*Stk. 3.* Minstaløn verður ikki veitt fyri fleiri dagar enn avvarðandi skip hevur fingið tillutað av fiskidøgum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, íroknað avhendaðum og umbýttum fiskidøgum.

**§ 3.** Tá fiskimaður sambært sáttmála eigur frítíðarløn av fiskiparti, rindar Trygdargrunnur fiskivinnunnar frítíðarløn av minstuløn eftir reglunum í løgtingslóg um frítíð við løn.

**§ 4.** Trygdargrunni fiskivinnunnar verður heimilað, í sambandi við útgjald av minstuløn, at mótrokna krøv, sum grunnurin hevur móti viðkomandi fiskimanni fyri útgoldið forskot og onnur gjøld.

## Kapittul 2

*Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn*

**§ 5.** Mánaðarligur minstiforvinningur verður veittur til útróðrarmenn, búsitandi í Føroyum, sum eru á útróðri á føroysku landleiðunum við føroyskt skrásettum fiskiførum, sum eru 110 tons ella minni.

**§ 6.** Fiskifar, sbrt. § 5, skal hava avreitt í minsta lagi fyri í meðal kr. 200.000 fyri hvønn tilmeldaðan persón seinastu 6 mánaðirnar frammanundan, og í minsta lagi fyri í meðal kr. 25.000 fyri hvønn tilmeldaðan persón seinastu 3 mánaðirnar frammanundan.
*Stk. 2.* Eru treytirnar í stk. 1 ikki loknar vegna serligar umstøður, kann frávik gerast 2 ferðir í einum álmanakkaári. Umsókn um frávik verður viðgjørt við serligum atliti at meginregluni um, at sannlíkindi eru fyri, at fiskifarið hevði komið undir skipanina, um tað hevði verið í vinnu.
*Stk. 3.* Frávik, sbrt. stk. 2, verður bert loyvt, um skrivlig umsókn saman við neyðugum próvtilfari fyriliggur, sbr. § 9, stk. 3, 2. pkt.

**§ 7.** Fyri at koma undir skipanina skal bátsformaðurin, ella tann, ið virkar sum bátsformaður, fyri hvønn mánað lata Trygdargrunni fiskivinnunnar skrivliga tilmelding við navni á fiskifari og lista yvir manningina, undirskrivað av manning og av bátsformanni. Tilmeldingin skal vera Trygdargrunni fiskivinnunnar í hendi í seinasta lagi fyrsta arbeiðsdag í mánaðinum, sum ætlanin er at koma undir skipanina.
*Stk. 2.* Eftir at freistin í stk. 1 er farin, kann tilmeldaða manningartalið ikki økjast. Kemur nýggjur persónur við á fiskifar fyri annan, ella fer ein av fiskifari, skal bátsformaðurin skrivliga boða frá hesum. Tilskilast skal, hvat tíðarskeið viðkomandi persónur skal vera tilmeldaður. Fráboðan um broytingar skulu vera Trygdargrunni fiskivinnunnar í hendi í seinasta lagi saman við mánaðaravrokningini.
*Stk. 3.* Verður tilmeldað fiskifar selt ella endaliga tikið úr vinnu, steðgar veitingin av minstaforvinningi frá hesum degi. Skylda er at boða frá hesum í seinasta lagi saman við mánaðarligu avrokningini.
*Stk. 4.* Manning á fiskifari, sum kemur undir skipanina við minstaforvinningi, kann ikki í sama mánaði koma undir hesa skipan við fleiri fiskiførum, ella skipanina við minstuløn í sama tíðarskeiði.

**§ 8.** Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn er kr. 12.000.
*Stk. 2.* Minstiforvinningurin verður skerdur við 50 oyrum fyri hvørja krónu, sum útróðrarmaðurin hevur forvunnið í fiskiparti og A-inntøku, fyriuttan minstaforvinningin.
*Stk. 3.* Fiskipartur verður roknaður sum 40% av bruttoavreiðingarvirðinum, býtt við í mesta lagi tilmeldaða manningartalinum.
*Stk. 4.* Fyri A-inntøku verður minkingin sbrt. stk. 2 roknað í mun til ta upphædd, sum útróðrarmaðurin sambært samtíðarskattaskipanini hevur fingið útgoldið í mánaðinum, sum minstiforvinningur verður veittur fyri, uttan mun til nær henda inntøka er forvunnin, undantikið er útgoldin minstiforvinningur.
*Stk. 5.* Minstiforvinningur verður roknaður í mun til, nær manningin hevur verið tilmeldað, sbr. við § 6.
*Stk. 6.* Av minstaforvinningi verður ikki veitt frítíðarløn.

**§ 9.** Minstiforvinningur verður avroknaður so skjótt, sum av eigara váttað mánaðaravrokning fyriliggur, tó í fyrsta lagi aftaná 15. í mánaðinum eftir, at hann er vunnin.
*Stk. 2.* Á mánaðaravrokningini skal greitt framganga fiskipartur hjá hvørjum persóni sær.
*Stk. 3.* Mánaðaravrokningin skal latast Trygdargrunni fiskivinnunnar, áðrenn hon er 3 mánaðir gomul. Sama tíðarfreist er galdandi fyri umsókn um frávik, sbr. § 6, stk. 3.

## Kapittul 3

*Forskot*

**§ 10.** Forskotskipanin heldur fram eftir teimum higartil galdandi reglum, og er mesta upphæddin kr. 650 um dagin.

## Kapittul 4

*Gildiskoma*

**§ 11.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. apríl 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 141 frá 29. desember 2010 um inntøkutrygd og forskotskipan.

Fiskimálaráðið, 23. mars 2011

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 22 28. mars 2011

# Kunngerð
# um
# ískoyti til gjald fyri veiting hjá privatstarvandi ergoterapeuti

Við heimild í § 8, stk. 3 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd verður ásett:

**§ 1.** Ískoyti til ergoterapiveiting frá privatstarvandi ergoterapeuti kann verða veitt persónum, yngri enn 18 ár, sum hava likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku, ið hava við sær munandi avleiðingar í gerandisdegnum.

**§ 2.** Ískoyti verður bert veitt til neyðuga og heilsuliga væl grundaða veiting eftir ávísing frá kommunulækna, sum starvast í kommunulæknaskipanini og serlækna í pædiatri, sum starvast í føroyska sjúkrahúsverkinum.

**§ 3.** Ískoyti til gjald fyri ergoterapiveitingar kann verða veitt sum einstaklingaveiting, tveypersónaveiting ella bólkaveiting.

**§ 4.** Ergoterapeutisk veiting skal verða veitt samsvarandi treytunum, sum eru ásettar í sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Heilsumálaráðið.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. august 2010.

Heilsumálaráðið, 28. mars 2011

**John Johannessen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705